# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2017

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing er løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 28. nov. 2018. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Jógvan Hansen, formaður

Jens Pauli Petersen, næstformaður

Marnar Pattinson, nevndarlimur

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

| | |
|---|---|
| Delta Seafood | Sandoy Seafood P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Nevið P/F |
| Scrabster Seafood | Faroe Origin P/F |
| Tavan Sp/f | Kósin P/F |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | FoFish Sp/f |
| Vestmanna Seafood | |

# Frágreiðing frá nevndini

*Umskipan av virkseminum hjá felagnum*

Á aðalfundi felagsins í 2017 varð kunnað um, at ætlanin var at umskipa virksemið hjá Ráfiskakeyparafelagnum, og aðalfundurin tók undir við at gera broytingar í umsitingaravtaluni, sum felagið hevur í nógv ár haft avtalu við Føroya Arbeiðsgevarafelag um skrivstovufelagsskap. Henda avtala hevur eisini hevur haft við sær, at felagið hevur haft ein ráðgeva í hálva tíð at arbeiða við bransjumálum fyri felagið og limir tess. Felagið hevur síðan seinasta aðalfund gjørt nýggja avtalu við Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum merkir, at felagið fær skrivstovuhjálp til nevndarfundir og aðalfundir, umframt avgreiðslu av smærri málum. Avtalan hevur tó eisini við sær, at eingin ráðgevi er fast knýttur at felagnum, og hjálp verður ikki veitt til bransjumál eftir 1. Januar 2019. Samstundis er kostnaðurin av avtaluni við Føroya Arbeiðsgevarafelag lækkaður.

Orsøkin til, at virksemið er umskipað, er serliga tann syndarliga gongdin í botnfiskafiskastovnunum, har vit nú í fleiri ár hava haft ein fiskiskap, sum er á sama støði ella verri enn í ringastu kreppuárum fyrst í 90'unum, og sum eisini hevur merkt fíggarligu viðurskiftini hjá felagnum. Harumframt hevur vertikala integratiónin millum keypara- og seljarasíðu í fiskivinnuni avmarkað, hvørji mál tað ber til at arbeiða við.

Broytingarnar í umsitingaravtaluni hava so eisini viðført, at nevndarlimirnir í størri mun taka sær av teimum bundnu uppgávunum hjá felagnum. Eitt nú hevur Jógvan Hansen yvirtikið sessin hjá felagnum í Fiskivinnuráðnum, har felagið hevur fastan sess. Jens Pauli Petersen er varaumboð í Fiskivinnuráðnum.

Marner Pattinson hevur yvirtikið sessin í stýrinum fyri Fiskivinnuroyndir, sum veitir stuðul til verkætlanir at menna fiskivinnuna.

Jógvan Hansen og Jens Pauli Petersen røkja sessirnar hjá felagnum í nevndini fyri Kassamiðstøðini, sum felagið eigur helvtina av.

Eisini verður tað frameftir í størri mun upp til nevndarlimir í felagnum at røkja bransjuáhugamálini hjá ráfiskakeyparunum.

Umskipanirnar í felagnum hava haft við sær, at fíggjaliga støðan er betrað. Eftir at felagið í fleiri ár á rað hevur haft hall, vísir roknskapurin fyri 2017 og ávegisroknskapurin fyri 2018 nú eitt positivt úrslit.

*Nýggj heimasíða um føroyskar fiskavørur*

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tikið stig til eina heimasíðu um føroysku fiskivinnu, føroyska aling og føroyskar fiskavørur. Ráfiskakeyparafelagið hevur saman við øðrum

feløgum innan fiskivinnuna valt at luttaka í og stuðla hesum arbeiði, og heimasíðan er nú um at vera liðug. Endamálið við heimasíðuni er bæði at kunna um føroysku skipanirnar innan fiskivinnu og aling, umframt at varpa ljós á føroyskar fiskavørur.

Partur av heimasíðuni er eitt *exporter directory*, har føroyskir fiskaútflytarar kunnu skráseta seg, og tær vørur, sum fyritøkan framleiðir.

Eisini kunnu vitjandi á heimasíðuni finna uppskriftir til nakrar lættar rættir úr ymiskum føroyskum fiskavørum, saman við nøkrum stuttum filmum við kokkinum Gutta Winther, har hann á enskum máli greiður frá, hvussu rættirnir verða tilgjørdir.

*Gongdin í vinnugreinini*

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum var í 2017 8,4 mia kr. í mun til í 7,6 mia. kr. í 2016. Sostatt vaks samlaði útflutningurin av fiskavørum við uml. 10% í mun til árið fyri. Vøkstur í útflutningsvirðinum var í so at siga øllum fiskasløgum, tó var ein minking í svartkjaftinum. Fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2018 er tó talan um eina minking í útflutningsvirðinum í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

Útflutningsvirðið av mest vanligu botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa vaks í 2017 við uml. 4% í mun til árið fyri, og samanlagt er vøksturin hildin fram higartil í ár, tó at útflutningsvirðið á upsa er minkað, meðan toskurin og serliga hýsan eru økt.

Búskapargongdin hjá flakavinnuni á landi hevur seinnu árini verið merkt av vánaligu gongdini í botnfiskiskapinum. Um hugt verður at samlaðu vinnuni undir einum, er at kalla einki yvirskot í vinnugreinini, hóast úrslitini eru eitt sindur ymisk frá virki til virki.

Lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum eru øktar við uml. 30 mió. kr frá 2016 til 2017, frá uml. 357 mió kr í 2016 upp í 387 mió kr. í 2017. Ein vøkstur hevur sostatt verið, men partur av hesum eru vanligar lønarhækkingar, og meira virksemi er eisini komið í uppisjóvarvinnuni í hesum árum. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Tekin eru um betringar í veiðuni eftir summum botnfiskasløgum, tó at veiðan sum heild framvegis er á lágum støði. Feskfiskaveiðan eftir mest vanligu fiskasløgunum var at kalla óbroytt frá 2016 til 2017. Higartil í 2018 hevur vøkstur verið í veiðuni av toski og hýsu, meðan minni av upsa hevur verið í mun til sama tíðarskeið í fjør.

*Marknaðaratgongd*

Felagið hevur seinastu árini roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd á nýggjum vakstrarmarknaðum, serliga í Suðuramerika og í Asia. Nakrir glottar hava verið, m.a. er fríhandilsavtala fingin í lag við Turkaland, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan arbeiðir við málinum at fáa okkum betri marknaðaratgongd til Brasil. Hòast framgongd er í málinum kundi RKF ynskt sær, at uppaftur meira orka varð nýtt til hetta mál.

Arbeiðið at fáa marknaðaratgongdina hjá føroyskum fiskaútflytarum á sama støði sum hjá okkara kappingarneytum verður ikki liðugt eftir einum ári. Ikki minst tí okkara kappingarneytar brúka nógva orku uppá at betra uppaftur meira um sína marknaðaratgongd. Serliga hjá einum lítlum landi sum Føroyar, krevur tað eitt áhaldandi arbeiði frá føroysku myndugleikunum at sannføra myndugleikarnar í einum landi um at tey skulu nýta orku uppá handilsavtalur og heilsufrøðiligar avtalur við Føroyar.

Royndirnar vísa, at tað tekur langa tíð at lata upp marknaðirnar fyri føroyskar fiskavørur. Tað er tí ov seint at taka samband við myndugleikarnar í hesum londum, tá trupulleikar eru á øðrum marknaðum, eitt nú ES-marknaðinum. Tað er neyðugt at arbeiða við at betra um atgongdina á so nógvum av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur sum gjørligt, so tað ber til at selja aðrastaðni, tá umstøðurnar á einum marknaði gerast truplari.